# Serv-You – Nýggj flutningsfyritøka




**Nýggj flutningsfyritøka í Leirvík. Flutningsfyritøkan Serv-You koyrir vørukoyring í Eysturoy, Norðoyggjum, Streymoy og Vágum**

VØRUFLUTNINGUR

*Heini S. Kristiansen*
*heinik@sosialurin.fo*

Flutningsfyritøkan Serv-You hevur bústað í Leirvík. Umframt vanligan vøruflutning, koyra teir eisini flogfrakt og koyra við pakkum í Eysturoy, Streymoy, Vágum og Norðoyggjum.

Viðskiftafólkini eru ikki bert virkir og stovnar, men eisini privat fólk, ið tørva vøruflutning ella hava eitthvørt ørindi. Serv-You fæst við bæði stóran flutning og minni ørindi.

Serv-You Transport koyrir sum sagt í meginøkinum, men teir hava samstarvsfelagar og kunnu tí avgreiða viðskiftafólk um alt landið

Vøran verður koyrd út sama dag ella morgunin eftir. Um tú hevur tørv á bráðfeingis flutningi, kunnu teir seta øll onnur ørindi til viks eftir avtalu.

Serv-You hevur viðskiftafólk, sum einans hava tørv á flutningi hendinga ferðir, og fastar kundar. Tað ber til at keypa 10-túra kort við avsláttri ella at geva eina fasta avtalu við Serv-You. Meira fæst at vita á www.serv-you.net.

## Eggjar fólki at fara til Saksunar og Gjáar

FERÐING

Fyri at betra um møguleikarnar hjá ferðafólki at koma til og frá nøkrum av Føroya vakrastu og mest vitjaðu plássum, økir Bygdaleiðir um koyringina til Gjáar og Saksun.

Strandferðslan upplýsir, at frá mánadegnum 26. juni til týsdagin 15. august verður busskoyring til Gáar økt, og nú er eisini møguligt at koma aftur og fram í vikuskiftinum. Sama tíðarskeið verður eisini koyrt til Saksunar hvønn gerandisdag í vikuni.

- Hettar ger tað møguligt hjá ferðafólki at gera dagstúrar til Gjáar og seinnapart túrar til Saksunar, sigur Strandferðslan.

# Fólk rýma frá ferðsluóhappum

**Løgreglan hevði eitt óvanliga friðarligt vikuskifti. Tó er ein óheppin gongd at fólk rýma frá ferðsluóhappum**

Vikuskiftið gekk friðarliga fyri seg hesaferð. Okkurt smávegis ferðsluóhapp var. Leygarnáttina klokkan 1 rendi ein bilur í bilverjuna við Áir. Bilurin fór sera illa, og tvey fólk vórðu koyrd á sjúkrahúsið. Tey høvdu tó ikki fingið nøkur álvarslig mein.

Annars vóru átta smá ferðsluóhapp, har ið einans skrokk-skaðar vóru avleiðingin.

Tað er vorðið vanligt, at fólk rýma frá ferðsluóhappum. Tað hendir, at onkur ger skaða á ein annan bil, og at viðkomandi ikki sigur frá, frætta vit frá vakthavandi á løgreglustøðini í Havn. Hetta er sera keðiligt hjá viðkomandi, sum eigur tann meiðslaða bilin. Løgreglan heitir tí á øll um at geva seg til kennar, um tú hevur verið í einum ferðsluóhappi. Hetta eisini, um tú hevur meinslað ein annan bil.

Á Fjarðastevnuni í Vestmanna gekk alt friðarligt og væl fyri seg. Einki var skrivað í døgnfrágreiðingini.

**HeiniK**

# Ógreiða um stuðulsviðurskiftini hjá næmingum

**- Við avgerðini hjá Fíggjarnevndini er sera óvist, um stuðulsviðurskiftini hjá næmingunum verða avgreidd, áðrenn skúlaársbyrjan í august, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður**

POLITIKKUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum harmastum, at Fíggjarnevnd Løgtingsins ikki hevur sett seg nóg væl inn í málið, tá nevndin tók avgerð um ikki at ganga umsóknini hjá landsstýrismanninum í mentamálum um eykajáttan til stuðlar í skúlunum á møti.

Í grundgevingini hjá Fíggjarnevndini verður ófullfíggjað víst til avgerð hjá Kærustovninum, og við hesum tekur Fíggjarnevndin avgerð um, at tað er landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, ið hevur ábyrgdina fyri at veita børnum við serligum tørvi stuðul í skúlatíðini.

Tað sum Fíggjarnevndin ikki tekur hædd fyri er, at avgerðin hjá Kærunevndini í almanna- og heilsumálum er grundað á, at eingin avtala er millum almannaverkið og skúlaverkið. Í samandráttinum av avgerðini stendur soleiðis:

»Avgerðin varð grundað við, at inntil almannaverkið og skúlaverkið hava funnið eina skipan viðv. stuðulsfólki til børn í skúlatíðini, so átti avslag upp á stuðulsfólk sum persónligan hjálpara - í teimum førum har tað er tørvur á slíkum stuðli í skúlatíðini - ikki at noktast skúlanæmingi einans vísandi til, at talan var um eina skúlaútreiðslu.«

Hesa skipan hava skúlaverkið og almannaverkið funnið semju um, og tað varð grundað á hesa semju, at mentamálaráðharrin sendi inn umbøn um játtan við fíggjarnevndarskjali. Talan er um eina politiska avgerð, har landsstýrismaðurin í mentamálum og landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum samdust um, at útreiðslurnar innan skúlagátt skulu haldast av einum og sama myndugleika. Við hesum varð staðfest, at verandi siðvenja, ið byggir á meginregluna um sektorábyrgd, skal vera galdandi.

Við avgerðini um ikki at ganga umsóknini hjá mentamálaráðharranum á møti, hevur Fíggjarnevndin avgjørt at seta meginregluna um sektorábyrgd til viks. Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum ivast í, um broytingin fer at viðføra eina meiri liðiliga og betri skipan fyri børnini. Landsstýrismaðurin vil tó í øllum førum gera sítt til, at børnini ikki gerast "svartiper" í hesum máli, og vil tí hervið boða frá, at hann fer at bera fram umsókn við nýggjum fíggjarnevndarskjali, so skjótt tingið er savnað eftir summarfrí. Við tað at talan er um at broyta verandi siðvenju, so er peningur til persónligar stuðlar í skúlunum ikki tøkur á játtanini hjá Almannastovuni.

- Við avgerðini hjá Fíggjarnevndini er sera óvist, um stuðulsviðurskiftini hjá næmingunum verða avgreidd, áðrenn skúlaársbyrjan í august, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður

Hans Pauli Strøm
landsstýrismaður